# Vinnandi dagbókin




**Yvir 150 føroyskir ungdómar skrivaðu dagbók á heimasíðuni Eg.fo, tá skipað var fyri dagbókakapping herfyri. Rósing Rasmussen vann fyri sína dagbók. Í samstarvi við Eg.fo prenta vit á hesi síðu vinnandi dagbókina.**

KAPPING
**Niels Uni Dam**
nielsuni@sosialurin.fo

## Dagbókin hjá Rósing, ið vann kappingina:

Kl. er farin av 12, og eg liggi í songini og hugsi. Tankarnir sveima bæði inn í tað emotionella og tað heimsspekiliga.

Í gjár gekk leiðin til Fuglafjarðar. Eitt stak feitt kvøld, har tað tó ikki slapst undan einum niðurtúri ella tveimum. Men hvat. Ein skal ikki lata seg missa fótafestið á hesum lívsins gøtum av nøkrum bagatellum, ið sum so einki hava at siga, men tó vera blást upp til nakað stórt, ið fær ein at smílast innantana morgunin eftir. Kanska fóru 1 ella 2 øl ov nógvar niðurum. Men hvat tá. Shit happens. Eftir sum at tað higartil bert eru farnir 50 min av samdøgrinum, so haldið eg, at eg eisini skrivi eitt sindur um dagin í gjár. Tað vil siga áðrenn kl. 24.00.

Eg fór upp kl. 10 eftir eina langa nátt. Tók mín vælsignaða iPod og rann eftir ringvegnum. Komin heim sovnaði eg skjótt, og hettar gjørdist eisini endin á degnum. Tí, tá ið eg vaknaði aftur kl 23.00, var eg so deiliga úthvíldur, at eg ikki sovnaði aftur. Tað er tí, at eg nú siti her og lati fingrarnar glíða tilvildarliga eftir knappaborðinum. Talgildu stavirnir fara brátt inn á skermin, og har standa tankar mínir sum negldir. Ein løgin verð vit liva í.




*Eg skrivaði eitt so einfalt orð sum 'Homofobia' inni á leitiheimasíðuni google. 80 úrslit*

Løgið, at so nógv fólk hava lagt seg so væl til rættis niðri í tí djúpa kanin-pelsinum. Ein, ið hevur lisið m.a Sofies Verden, veit helst, hvat eg meini við. Løgið, at fólkið, ið gongur á hesari klótu, ivast so lítið um hví, hvaðani og hvussu. Tað er í hvørtfall mín meining. 'Kristnu' Føroyar kalla vit okkum. Indoktrineraði ungdómurin er sanniliga ósjálvstøguðari enn áður. Tað er ein láturlig tilvera. Tilvera. Hvat er tilveran í grundini? Vit hava nógv ymisk sjónarmið. Summi víðgongd, summi meira tolerant. Líka tolerant sum kristindómurin, hevði Jenis sagt. Kanska Darwin, kanska Jesus. Tað fáa vit at vita, tá vit doyggja, ella fáa vit tað ikki at vita. Hvat tilvild og tilvera er.



*Kanska fóru 1 ella 2 øl ov nógvar niðurum. Men hvat tá. Shit happens.*

Verkætlanin í 9. júst farin um bak, og vit í flokkinum bíða spent eftur próvtalinum. Summi fáa kanska eitt væluppiborið 11-tal. Summi eitt heldur snópisligt 7 ella 8-tal. Í okkara bólki hava vit havt um eitt sera spennandi evni, ið hevur tikið mangar tímar úr lívi mínum. Um eg so havi nakað lív. Kanska eri eg settur til eina teldu ella okkurt annað, sum sendir myndir inn í meg og organiserar mín dag. MATRIX. Uttan at nevna hvat evni vit høvdu, kann eg siga, at tað var ein sera áhugaverd arbeiðsgongd, har nógv spurdist burturúr. Hettar gjørdi eisini mína hugsan um Føroyar og nógvar føroyingar greiðari. Bara hettar 266b málið. Tað eru nakrar andaligar amøbur í samfelagnum, sum veruliga hava brúk fyri fleiri sjónarhornum. Tann myndin útheimurin hevur sæð av 'okkum', sum tað sjálvandi bleiv til, hevur ikki verið sørt smikrandi. Eg skrivaði eitt so einfalt orð sum 'Homofobia' inni á leitiheimasíðuni google. 80 úrslit, har orð sum 'fundamentalist' og 266b komu fram á skermin. Hvat sigur hettar. Úrslitini vóru bæði á italienskum, sponskum, enskum, donskum o.s.fr. Vit lata ein sera eggjandi, andaligan, sýnisglugga upp fyri umheiminum. Segði nakar Visión 2015. L.Á.T.U.R.L.I.G.T!



*Kanska eri eg settur til eina teldu ella okkurt annað, sum sendir myndir inn í meg og organiserar mín dag. MATRIX.*

Hettar var so ein brøkpartur av mínum hugsanum. Dagbók. Tað er her, eg setið mínar villastu tankar.



*Tað er tí, at eg nú siti her og lati fingrarnar glíða tilvildarliga eftir knappaborðinum*

Góðanátt. Nú sløkki eg ljósið. Ella um tað veruliga er eg, veit eg ikki. Tað sløknar, í hvussu so er, tá ið eg trýsti á kontaktina.




*Segði nakar Visión 2015. L.Á.T.U.R.L.I.G.T!*